ítróttur

Nr. 149 • týsdagur • 9. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Alina rýmd til franskt felag

Klaksvíkingar vistu av ongum

Sterki rumenski bakkurin hjá Stjørnuni, Alina Olaru, ið átti sín stóra part í gullkrónunum hjá klaksvíkingum síðsta kappingarár, hevur gjørt avtalu við eitt felag í fremstu fronsku deildini. Klaksvíkingar vistu av ongum.

LEIKARAFRÁGONGD
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað gjørdi góðan mun hjá Stjørnuni í fjør, at liðið um jóltíðir fekk Alinu Olaru til felagið úr StÍF. Rumenski bakkurin gjørdist skjótt ein lyklaleikari hjá Stjørnuni, og eingin ivi er um, at hon átti ein stóran part av heiðurinum av, at tað eydnaðist klaksvíkskvinnum at ogna sær greipuna.

Spældi við fríggjakvøldið

Leiðslan í Stjørnuni helt eisini, at Alina Olaru fór at verða partur av liðnum aftur í ár. Eftir summarfrítíð í Rumenia, kom hon herfyri aftur til Føroya, og fríggjakvøldið var hon við, tá ið Stjørnan spældi móti Ikast Bording í KÍ-høllini.

Tá ið so Stjørnan og Alina skuldu samráðast um løn, gjørdi rumenin teimum greitt, at hon skuldi ikki hava nakra løn frá Stjørnuni, tí hon fór til Fraklands at spæla, greiðir formaðurin í Stjørnuni, Kristoffur Ragnarsson, frá. - Hetta kom ógvuliga óvart á okkum, tí vit høvdu gjørt eina avtalu fyri komandi kappingarár, sigur hann.

Formaðurin í Stjørnuni sigur tó, at felagið allatíðina hevur vitað, at Alina kundi hugsað sær at sloppið at royna seg í einari sterkari kapping enn tí føroysku, men at tað skuldi henda so bráddliga, og uttan at leiðslan í Stjørnuni visti av nøkrum, kom ógvuliga óvart á Kristoffur Ragnarsson.

Hvørki formaðurin í Stjørnuni ella venjarin, Rógvi Nielsen, vita, hvussu nýggja felagið hjá Alinu Olaru kallast, men teir siga tó, at sambært rumenska leikaranum er talan um eitt lið í bestu fronsku deildini.

Rumenski bakkurin hjá Stjørnuni, Alina Olaru, ið eisini hevur spælt við StÍF, fer nú at royna seg í bestu fronsku deildini.
savnsmynd

Franska hondböltsdeildin telist millum tær sterkaru í Europa, tó nakað aftan fyri eitt nú tí donsku og tí norsku.

Vilja hava endurgjald

Formaðurin í Stjørnuni greiðir frá, at spæliloyvið hjá Alinu Olaru er framvegis í Klaksvík, og hann sigur, at felagið ikki fer at utflýggja loyvið, fyrr enn Stjørnan hevur fingið endurgoldið tær útreiðslur,ið tað hevur havt av rumenska leikaranum. - Vit hava goldið ferðaseðil millum Føroyar og Rumenia fyri hana, og somuleiðis hava vit rindað eina ávísa upphædd fyri at fáa hana leysa av øðrum felagi. Hetta vilja vit fegin hava endurgoldið, áðrenn vit útflýggja franska felagnum spæliloyvið hjá Alinu Olaru, sigur Kristoffur Ragnarsson.

Spurdur um Stjørnan nú fer út at leita eftir einum avloysara fyri Alinu Olaru, ella um man tekur til takkar við tí leikaratilfari, sum frammanundan er í felagnum, sigur formaðurin í Stjørnuni: - Vit fara beinan vegin at leita eftir nýggjum spælara, og tað verður leitað uttanlands, sigur Kristoffur Ragnarsson, sum vónar, at felagið hevur fingið okkurt upp á pláss í hesi vikuni við nýggjum spælara.

Jákup og Julian ivasamir s. 27

Í dag fellur hamarin

Teir útlendsku fótbóltsspælararnir, sum ikki á midnátt í kvøld hava fingið spæliloyvi, hava ongan møguleika at spæla við í Føroyum í ár

ÚTLENDSKIR SPÆLARAR
Jóannes Hansen

Tað verður ivaleyst arbeitt av lívsins kreftum á fleiri frontum í føroyska fótbóltsheiminum í dag. Ásetingarnar hjá FSF, sum feløgini sjálvi hava samtykt, siga, at seinasta freist at fáa útlendskar spælarar í sín part er 10. august. Í dag er 10. august. Tað vil við øðrum orðum siga, at tá ið tað er farið um midnátt í kvøld, er eingin møguleiki at leita sær styrk uttanfyri landoddarnar.

Seinastu tíðina eru fleiri spælarar komnir henda vegin. B68 hevur fingið tríggjar brasiliumenn. Hjá tveimum hava viðurskiftini verið í rættlagi. Á portalinum stóð sunnudagin, at loyvini hjá tí triðja eisini vóru komin upp á pláss. Tey tíðindini undraðust teir yvir á Toftum. Tí teir vistu, at loyvini vóru ikki komin upp á pláss. Men teir vóna, at tað fer at eydnast at fáa hetta í rættlag í dag.

Loyvini hjá nýggja pólverjanum í Gøtu komu upp á pláss eftir døgurða fríggjadagin. Adam spældi ímóti B68, og hann skoraði fyrsta málið, tá ið hann hevði verið knappar nógglu minuttir á vøllinum.

Tveir útlendingar hava í eina viku verið í Fuglafiði. Í gjár stríddust teir við at fáa loyvini upp á pláss.

Síðsta skotið á útlendska fótbóltsbulinum í Føroyum, sum vit vita um, er ein nigerianskur álopsspælari, sum er komin til Runavíkar. Í gjár arbeiddu teir við at fáa loyvini upp á pláss. Sambært NSÍ heimasíðuni eitur hesin maðurin Onyeme Ikechukwu. Hann er 20 ára gamalur og er komin henda vegin úr Suðurafrika, har hann hevur roynt seg í næstbestu deildini. Hann sigst hava spælt í einum felag, sum eitur Ledwaba Power Stars.

NSÍ heimasíðan visti í gjár at siga, at teir í felagnum vónaðu, at hesin maðurin kundi vera við í gjárkvøldið, tá ið NSÍ skuldi spæla á heimavølli ímóti ÍF. Tá vóru Kári Hansen og Alexander Jovevic leikbannaðir.

Mannagongdin

Tað er Innlendismálaráðið, sum frá løgregluni fær umsóknina til ummælis. Tað er um umsóknina, sum feløgini hava latið løgregluni. Eftir viðgerðina í Innlendismálaráðnum verður umsóknin send aftur til løgregluna, sum síðani sendir hana til Udlændingestyrelsen í Danmark. Har verður arbeiðsloyvi til ávíst tíðarskeið givið. Tá ið tað er í lagi, verður loyvi sent aftur til løgregluna í Føroyum, og so verður tann, ið eigur loyvið, boðsendur at møta hjá løgregluni fyri at fáa loyvið handað.

Arbeiðsloyvi ber uppihaldsloyvi við sær. Tá ið hetta er komið upp á pláss, er næsta stigið at melda flyting í føroysku kommununa. Tá ið tað er fingið frá hondini, og p-talið er skrásett, ber tað til at venda sær til Fótbóltssambandið við áheitan til teir um at fáa spæliloyvi. Tað ger FSF, tá ið teir hava fingið prógv frá Landsfólkayvirlitinum um, at føroyski bústaðurin er í lagi, og tá ið FSF frá øðrum fótbóltssambandi hevur fingið grønt ljós. FSF kann fáa leysgevingina frá útlendska fótbóltssambandinum, áðrenn tað er greitt við arbeiðsloyvinum, men tað er ikki loyvt FSF at útflýggja spæliloyvið fyrrenn hini viðurskiftini eru komin upp á pláss.

Tá ið vit tosaðu við Pætur Clementsen, sum hevur við hesi viðurskiftini í FSF at gera, í gjár, dugdi hann av góðum grundum ikki at siga okkum, hvørji loyvi fóru at verða útskrivað í dag. Men á midnátt í kvøld verður greitt, um talan verður um onkran fótbóltsspælara, ið er komin henda vegin, og sum kortini ikki sleppur upp í part at spæla.

Klaksvíkingar á frostmarkinum

B36 fór aftur til Havnar við øllum trimum stigunum, eftir at teir sunnudagin høvdu verið á vitjan í Klaksvík og vunnið 1-0 á KÍ.
mynd: Simun á Høvdanum

Sjáldsama fáu áskoðararnir vóru vitni til, at B36 - eftir at teir beinanvegin høvdu gjørt sítt - ikki løgdu í at ovbyrja seg, og so sóu áskoðararnir, at heimaliðið megnaði ikki at lyfta seg úr siropinum, sum teir tykjast standa fastir í

KÍ-B36
Jóannes Hansen

Tað gongur, sum tað plagar, og hesa ferð var talan kanska um vánaligasta avrikið av øllum í hesum árinum. Heldur ikki ímóti B36 megnaði KÍ at gera mál, og harvið var sjálvsagt eingin møguleiki fyri, at teir skuldu vinna.

Fyri fjórði ferð á rað fór B36 úr Klaksvík við øllum stigunum. Teir fingu mál beinanvegin. Jens Kristian Hansen legði innfyri miðskeiðis av KÍ helvtini úr vinstru, og tá ið misskiljing í KÍ verjuni hevði við sær, at bólturin ikki varð ruddaður av vegnum, takkaði Egil á Bø, sum hesa ferð var í B36 álopinum, fyri. Hann setti krúllin undir bóltin, sum fór í netið. Harvið hevði B36 lagt seg á odda, og fyritreytirnar styrknaðu hjá teimum at verja um tað, sum teir høvdu fingið.

Fyrr í summar tóktist B36 vera á veg ímóti trivaligum sigri. Ta ferðina sveik konsentratiónin. Klaksvíkingar fingu um endan, spældu í 2. hálvleiki sum leyvur, teir javnaðu til 2-2, og tað var um reppið, at teir eisini fingu sigursmálið.

Hesa ferð var B36 í gásareygum bara frammanfyri við einum máli. Men teir vórðu ongantíð móttir. Talan var avgjørt ikki um meistaraspæl, og spurningurin fer altið at vera ósvaraður, hvussu tað hevði tørnað út, um heimaliðið hevði verið fört fyri at lagt B36 undir sama trýstið, sum teir gjørdu í Gundadali í øðrum leikumfari.

KÍ liðið legði ikki B36 undir trýst. Tað megnaðu teir ikki. Heldur ikki fram ímóti dystarenda, tá ið trivaliga áskoðarafjøldin í Klaksvík plagar at bera sítt lið fram til trýst og mál, sum so plaga at bera stig við sær. Hesa ferð vóru fótbóltslíkindini so góð, sum tað kann ímyndast, at tey kunnu vera. Men tað vóru ikki fleiri klaksvíkingar, enn tað plaga at vera leygardagar, tá ið teir næstbestu spæla. Og teir, sum, hóast vánaligu gongdina higartil í ár, savnaðust á Eiðinum, tóktust ikki trúgva uppá, at teirra lið skuldi fáa fatur í langa endanum. Heldur ikki um áskoðararnir høvdu stuðlað og borið.

Talan var ofta um langar sendingar. Bólthaldarin hjá KÍ hevði ongantíð nógvar møguleikar at spæla. Teir fluttu seg ikki nóg nógv og skjótt. Tískil eru tað fáir, sum bjóða seg fram, og so verður talan oftast um langar sendingar. Jacob Bymar og Erling Fles royndu, og onkra ferðina var um reppið, at teir gjørdust leysir. B36 verjan hevði somu manning, sum hon hevði næstsíðst, tá ið vit vístu á, at teir fýra - Allan Mørkøre, Jóhannes Joensen, Pól Thorsteinsson og Jens Kristian Hansen - tilsaman hava spælt knappiliga hálvt annað hundrað landsdystir. Og teir vóru ov rutineraðir til at geva klaksvíkingunum nakra ikki ætlaða og framskundaða hundrað ára føðingardagsgávu.

Magnus Poulsen var í B36 málinum, og hann hevði so at siga einki høvi at vísa, hvør dugur tað er í honum. Ta einu ferðina í 1. hálvleiki stútaði Leon Bjartalíð í tvørtræið og uppum. Tað var einasta ferðin, sum tað við einum góðum vilja kundi tosast um royndi móti B36 málinum.

At tað hevði verið linligt og við ongum hugflogi í fyrra umfarinum hevði við sær, at KÍ venjarin beinanvegin eftir steðgin gav tveimum av teimum, sum høvdu verið á beinkinum, møguleikan. Harley Bertholdsen loysti Jan Andreasen av, og Arnhold Joensen kom inn fyri Eyðun Klakstein. Men tað segði tað sama hjá KÍ.

Overaðu seg ikki

Merkisvert var tað, at B36 miðvøllurin var mannaður við lutfalsliga óroyndum spælarum. Burtursæð frá brasiliumanninum var talan um tríggjar spælarar, sum eru uppvaksnir í B36. Frammanfyri teir vóru John Petersen og Egil á Bø, sum seinnu árini bara hevur verið verjuspælari.

B36 spældi sig ikki til upplagdar møguleikar. Eisini hjá teimum var ofta talan um langar sendingar og um skeivar sendingar. Allan Mørkøre hevði stutt eftir einasta málið góða royndi úr høgra borði, men bólturin fór skeivu megin handara stólpan.

Bergur Midjord kom á vøllin fyri John Petersen, tá ið eitt korter var eftir. Hann gjørdist fram ímóti dystarenda einsamallur innanfyri KÍ verjuna, men vinkulin gjørdist nakað spiskur, og so var tað ikki so torført hjá Jákupi Mikkelsen at verja fyri.

B36 spælararnir og ikki so ógvuliga nógvu viðhaldsfólkini vóru ovurfegin, tá ið tey í dýrdarveðrinum fóru úr Klaksvík. Men samstundis vóru tey greið yvir, at hóast avrikið hevði borið fulla úrtøku við sær ímóti KÍ, so verður neyðugt við betri avrikið næstu ferðirnar, um tað skal hugsast um at vinna meistaraskapin frá grannunum.

KÍ-B36 0-1 (0-1)

0-1: Egil á Bø 2.
Dómari: Eiler Rasmussen
KÍ: Jákup Mikkelsen - Jan Andreasen (Harley Bertholdsen, 46.), Ovi Nysted, Niclas Niclasen, Marek Wierzbicki - Leon Bjartalíð, Atli Danielsen, Eyðun Klakstein (Arnhold Joensen, 46.), Simun Joensen - Jacob Bymar, Erling Fles (Julian Samuelsen, 72.)
Gult kort: Niclas Niclasen, Ovi Nysted, Atli Danielsen
B36: Magnus Poulsen - Allan Mørkøre, Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson, Jens Kristian Hansen - Kenneth Jacobsen (Ronnie Samuelsen, 89.), Niels Joensen, Klæmint Matras, Alex Dos Santos - John Petersen (Bergur Midjord, 75.), Egil á Bø
Gult kort: Niels Joensen

Ætla framvegis at taka HB

Vit spæla fyri møguleikanum so leingi, sum vit hava hann, sigur B36 veteranur

KÍ-B36
Jóannes Hansen

B36 fekk øll stigini við sær úr Klaksvík. Tað hava teir gjørt fleiri tey seinastu árini. Men onkra ferðina hevur leikliga avrikið verið meiri sannførandi, enn tað var hesa ferð.

- Rætt er tað. Men vit eru hjartans fegnir um, at tað eydnaðist. Tað er hugaligt at vera við so leingi, sum man hevur møguleikan. Tað eru nógvir góðir spælarar á liðnum, og eg ivist ikki í, at spælið kann gerast betri. Hesa ferð ráddi tað um stigini, og tey fingu vit, staðfestir Jens Kristian Hansen, sum sigur, at eingin vandi er fyri, at John Petersen ikki verður við ímóti GÍ. Álopsspælarin fór av vøllinum, tá ið tað restaði eitt korter. Hann hevur smávegis trupulleikar við knænum.

Tit halda tykkum framvegis hava møguleika at vinna FM?
- Tað hava vit, og vit fara at stríðast fyri at varðveita møguleikan. Um tað eydnast okkum at fáa fult hvørja ferð, so kunnu vit ikki gera meiri. So mugu vit vóna, at HB kiksar í onkrum dysti.

Tit kendu tykkum ikki kroystar í Klaksvík?
- Tá ið munurin bara er eitt mál, kann alt henda. Men eg haldi ikki, at Magnus Poulsen í málinum hjá okkum nakra ferðina noyddist at tveita seg fyri at bjarga. Kanska legði hann seg omanyvir bóltin onkra ferðina, tá ið teir royndu langt úti frá, men tað var einki at tosa um, sigur Jens Kristian Hansen.

Lagið er í botni

Klaksvíkingar halda leikliga avrikið ímóti B36 vera eitt tað vánaligasta á árinum

KÍ-B36
Jóannes Hansen

KÍ fyllir hundrað um fjúrtan dagar. Øll tiltøkini, sum felagið hevur skipað fyri í tí sambandinum, hava gingið sum eftir ánni. Eisini fótbóltsskúlin í síðstu viku og fótbóltskappingin í yngru deildunum, sum var um vikuskiftið.

Í hesi kappingini vunnu KÍ piltarnir. Teir tykjast rættuliga evnagóðir og ivaleyst fara fleiri teirra um nøkur ár at vera við til at styrkja um besta liðið. Í løtuni gongur tað av skriðuni hjá besta liðnum. Tað skal leitast langt og leingi eftir einum ári, har KÍ bara hevur vunnið eina ferð á heimavølli.

Soleiðis er tað í ár. Sunnudagin tóktist sum um, at sjálvsálit og íblástur eru burtur.

- Vit flyta okkum ov lítið fyri hvørjum øðrum. Bólthaldarin hevur ov fáar møguleikar, og so endar tað alt ov ofta og í dag oftast við longum sendingum fram til álopsspælararnar, og tað er sjálvandi ikki nóg gott, staðfestir liðformaðurin, Atli Danielsen.

Tá ið KÍ sunnudagin skal norður á Mølini á Eiði verður talan um rættuliga skert lið, um sammett verður við teir fyrstu ellivu ímóti B36. Jákup Mikkelsen verður neyvan við orsaka av vøddaskaðanum, sum hann fekk ímóti B36, og bæði Ovi Nysted og liðformaðurin, Atli Danielsen, eru leikbannaðir eftir gul kort ímóti B36.